# Soleiðis leggur tú turriklæðið og dregur stiman

**Alt fleiri siga seg ikki orka í turriklæðið, tí tað er so fesjut og ringt at leggja. Men Jóna Vang, seymikona, heldur, at um turriklæðið er passaligt í støðd, so eigur tað at kunna leggjast uttan at fara av lagi aftur**

Lagt til rættis: Eydna Skaale • Myndir: Jens Kristian Vang

1



Jóna viðmælir at leggja turriklæðið, áðrenn bristið og stimin verða ordnað. Syrg fyri at spíssjurin er mitt aftan. Legg turriklæðið heilt inn at hálsinum, og toga varliga við flatari hond av akslunum inn ímóti hálsinum, inntil tú merkir, at tú fært flutt armarnar, uttan at turriklæðið fer av lagi.

2



Síðani leggur Jóna 3 lek í øðrumegin framman. Trý lek eru hóskandi, um turriklæði ikki er alt ov stórt. Men har má man meta um sjálv.

3



Ein miðalstór sikkurheitsnál verður sett í lekini, soleiðis, at tey ongan veg fara. Ansa bara eftir, at nálin ikki verður sett ov ovarliga, so hon kemur undan bristinum. Jóna viðmælir at festa nálina í brósthaldaran ella toppin, sum tú ert í innanundir, so turriklæðið ikki fer nakran veg.

4



Ger tað sama hinumegin

5



Fest bristið

6



So skal brosjan setast í. Hon skal bara taka í ein lítlan part av turriklæðum, sum jú longu er væl fest

7



Stimin skal so dragast ígjøgnum. Byrjað verður altíð ovast vinstrumegin

8



Síðani verður drigið ígjøgnum aðruhvørja mallu, og nálin verður fest. Jóna heldur, at tað veldst um hvussu long ketan er, um man dregur einaferð tvørturum aftur ovast

9



Soleiðis sær tað endaliga úrslitið út. Turriklæðið kemur ikki ov langt niður á armin, og tað liggur heilt inn ímóti hálsinum. Á hendan hátt fer tað ikki av lagið, og tað kennist ikki fesjut at ganga í

10



Um turriklæðið skal liggja væl, skal tað ikki koma ov langt niður aftan. Summi turrikløð koma heilt niður á rumpuna, og tað skulu tey ikki. Spísjurin skal vera á rygginum, og ermarnar skulu síggjast undan turriklæðnum

## Góð ráð um turriklæðið frá Jónu Vang:

*• Størsti trupulleikin við at fáa turrikløðini at ligga pent er ofta, at tey eru alt ov stór. Tey koma heilt niður á albogan, og bara tú flytir armarnar eitt vet, so fer alt upp úr framman. Turriklæðið skal ikki koma longur niður enn á miðjan yvirarmin. Tá fært tú flutt teg og dansað alla náttina, um tað skal vera. Men tá turrikløðini eru ov stór fáast tey ikki at liggja pent, óansæð hvussu tú stríðist.*

*• Um brosjan skal halda øllum turriklæðum uppá pláss, verður eisini torført at fáa tað at liggja pent. Jóna viðmælir at nýta sikkurheitsnálir, og brosjan skal bara akkurát taka í turriklæðið.*